


*– Eg trúgvi, at flestu journalistar droyma um at skriva bøkur, og tað havi eg so eisini gjørt. At bæði abbi og pápi hava givið nógvar bøkur út, hevur kveikt hugin serliga nógv og víst mær, hvussu hetta kundi gerast, sigur 33 ára gamli journalisturin, Uni Arge, sum á fyrsta sinni roynir seg sum rithøvund*

*Mynd: Jens Kr. Vang*

# Uni dystast við fortíðina

**Í nýggjari bók viðger ungi rithøvundurin, Uni Arge, tey mest umrøddu málini í almenna orðaskiftinum seinnu árini. Hann gongur tí ímóti rákinum, tí lítið hevur verið at sæð av bókum um samtíðina á bókahillunum seinnu árini**

NÝGGJ BÓK
*Páll Holm Johannesen*
*pall@sosialurin.fo*

Nú verðin liggur opin fyri okkum, kunnu vit ikki bara vera forelskað í fortíðini. Vit mugu taka støðu til heimin nú og í framtíðini. (»Komin er nú onnur øld« s. 108)

Forelskilsið hjá føroyingum við fortíðina ætlar 33 ára gamli journalisturin, Uni Arge, at gera eina roynd at víðka til eisini at umfata samtíðina. Í hansara fyrstu bók, »Komin er nú onnur øld,« lýsir og viðger ungi rithøvundurin tey mest umrøddu málini í almenna orðaskiftinum seinnu árini.

– Vit hava havt eina rúgvu av stórum málum seinastu 20 árini, sum hava havt avgerandi ávirkan á, hvar vit sum samfelag standa í dag. Við bókini vil eg koma nærri spurninginum, hvørjar avbjóðingar standa fyri framman. Bókin roynir ikki at siga nakran endaligan sannleika. Eg royni at geva lesarunum fortreytir at hugsa víðari um, hvagar vit fara, greiðir Uni Arge frá.

Bókin hjá Una Arge er býtt upp í átta partar. Ungi rithøvundurin setir millum annað spurningarnar, um rasisma kann taka seg upp í Føroyum, um ein tjóðskaparlig semja er í eygsjón, um íslendingar skulu keypa Føroya Banka, og um føroysk mentan er steðgað upp í fortíðini.

Spurt verður eisini, um áttatiárini framvegis hanga sum ein moralsk marra yvir politisku skipanini og vinnulívinum, um fjølmiðlarnir eru vorðnir undirhaldsmaskinur, og um stressaði livihátturin nú á døgum gevur nakra meining.

## Vantandi dýpd

Spurdur, hví hann hevur valt at skriva bókina, svarar Uni Arge, at hann hevur leingi saknað, at tey týdningarmestu málini í føroyska samfelagskjakinum verða viðgjørd í einum samanhangi. Hann heldur, at fjølmiðlarnir í alt ov stóran mun leggja seg eftir at siga persónssøgur heldur enn at koma inn til kjarnan í stórmálum. Ungi rithøvundurin vónar, at bókin »Komin er nú onnur øld« kann vera við til at seta nøkur mál í føroyska samfelagskjakinum í breiðari samanhang.

– Vit steðga ongantíð á í øllum fjølmiðlaresinum. Í samband við eitt nú útlendingamálið hoyra vit um persónar, sum eru komnir illa fyri, men vit koma ongantíð inn til kjarnan í málinum. Eftir mínum tykki vantar tað ofta, at vit lýsa málini niðri á jørðini, so vit róliga fáa eina fatan av, hvat tey í veruleikanum snúgva seg um, heldur Uni Arge, sum í bókini hevur skrivað kapitlar um bæði útlendingamálið og fjølmiðlarnar.

## Fortíð heldur enn samtíð

Í føroyska bókmentaheiminum er ikki vanligt at hoyra um bøkur, sum viðgera samtíðina. Í øðrum londum koma rúgvuvís av bókum, sum viðgera týðandi aktuell mál, meðan føroyingar hava verið rættiliga trekir at skriva hetta slagið av bókum. Heldur enn at skriva um tíðina, vit liva í, hevur hugurin hjá føroyskum rithøvundum staðið til at skriva um hetjur í fortíðini.

Spurdur, hví so fáar bøkur um samtíðina verða givnar úr í Føroyum, svarar Uni Arge:

– Vit leita nógv aftur í fortíðina, tí vit hava stóra trongd at lesa um, hvaðani vit stava, og hvørji vit eru. Føroysk søguskriving er ung, og enn royna vit at styrkja okkara samleika. Eg haldi, at føroyingar vilja uppfatast sum eitt djarvt fólkaslag, og hetta fáa vit váttað, tá vit lesa um fólk, sum hava bygt land undir truplum umstøðum. Hyggur tú eftir sølutølunum, so elska vit at lesa um stríðsmenn, sum hvørki lótu seg kúga av mótgangi ella deyðsótta. Fiskivinnusamfelagið hevur givið okkum nógvar hetjur, svarar nýklakti rithøvundurin.

Uni Arge væntar kortini, at fleiri kjakbøkur ella samtíðarbøkur fara at koma út í framtíðini.

– Tað er altíð áhugavert at lesa um tíðina, tú sjálvur livir í, og tá hugsi eg ikki bara um ítøkiligar hendingar, men eisini um tankar hjá fólki um avgerandi mál uppi í tíðini. Sjálvandi skulu vit kenna okkara søgu, tí eitt søguleyst fólk er eitt rótleyst fólk. Men leita vit bara aftureftir, síggja vit kanska ikki avbjóðingarnar og møguleikarnar í okkara egnu tíð. Eg vænti, at tað er bert ein spurningur um tíð, áðrenn fleiri bøkur um samtíðina koma út, sigur hann.

## Arge og bøkur

Nevnir tú eftirnavnið Arge, so er ikki heilt óhugsandi, at viðkomandi hevur tokka til at skriva bøkur. Bæði abbi og pápi Una, Niels Juel og Jógvan Arge, hava dúgliga skrivað bøkur, og spurdur, um hann ætlar at taka tráðin upp eftir abban og pápan, svarar Uni:

– Mær hevur altíð dámt væl at skrivað. Eg veit ikki, um tað er arvaligt, ella um eg eri ávirkaður av umhvørvinum. Helst er talan um bæði. Eg trúgvi, at flestu journalistar droyma um at skriva bøkur, og tað havi eg so eisini gjørt. At bæði abbi og pápi hava givið nógvar bøkur út, hevur kveikt hugin serliga nógv og víst mær, hvussu hetta kundi gerast, sigur ungi rithøvundurin.

Spurdur, um ætlanin er at geva fleiri bøkur út, svarar hann, at tað kann bara tíðin vísa.

– Tað er við bivandi hjarta, at eg bjóði meg fram við fyrstu bókini, men verður hendan bókin væl móttikin, fái eg kanska mót til at royna meg aftur, sigur Uni Arge.

### FAKTA

Uni Arge er føddur 20. januar 1971 í Havn. Hann fekk studentsprógv í 1990 og prógv av Journalistháskúlanum í Århus í 1999. Uni hevur starvast í Sjónvarp Føroya, Útvarpi Føroya og á Dimmalætting. Hann hevur eisini verið styttri tíðarskeið verið framvið á Dagblaðnum og Sosialinum. Seinnu árini hevur hann verið fríyrkismaður, har hann hevur skrivað hópin av greinum til Dimmalætting, Sosialin, Fregnir og onnur bløð. »Komin er nú onnur øld« er hansara fyrsta bók.



UTTAN ÚR HEIMI

# Vilja sleppa undan nýggjum køldum kríggi

**Vesturheimurin hevur einki veruligt at bjóða Ukraina fyri at fáa landið knýtt tættari at tí evropeiska samstarvinum, og tí fær andstøðan har heldur ikki tey stóru lyftini. Harafturat hava bæði ES og USA tørv á Russlandi, men fyribils verja báðir partar rættindini hjá ukrainum til at loysa kreppuna**

UKRAINA
*Árni Joensen:*
*fartekst@mail.dk*



*Vesturheimurin vil hava Viktor Jusjtjenko til forseta, men hevur lítið og einki at bjóða honum.*

Fyri ikki so nógvum árum síðani mundi fáur ímynda sær eitt sjálvstøðugt Ukraina, men tá Sovjetsamveldið syndraðist fyri trettan árum síðani hendi tað kortini. Ukraina gjørdist eitt sjálvstøðugt ríki, og so hendi tað uttan so mikið sum ein einasta dropa av ukrainskum blóði.

Men Vesturheimurin hevur ongantíð gjørt sær greitt, hvat hann skuldi gera við tað stóra landið, tess fruktagóðu landbúnaðarjørð, tann stóra ídnaðin ella landsins næstan 50 milliónir íbúgvar. Ukraina varð sett út á síðulinjuna, meðan ES og NATO fóru undir at samráðast við gomlu stuðulslondini hjá Sovjetsamveldinum í Eystur- og Miðevropa.

Russar hava harafturímóti virkað miðvíst fyri at gera Ukraina til ein politiskan samstarvsfelaga og til ein part av teimum russisku búskaparáhugaøkjunum. Nógvir russar eru framvegis av teirri áskoðan, at tað ukrainska sjálvsstýrið var eitt mistak, tí í teirra eygum hoyrir Ukraina til Russland bæði mentanarliga og søguliga.

Tað var greitt, at fyrr ella seinni fóru áhugamálini hjá Russlandi og Vesturheiminum at stoyta saman, og nú er tað hent.

## Hvør sítt valevni

USA og Evropa hava lagt russiska forsetan, Vladimir Putin, undir at royna at mynda Ukraina eftir russiskum leisti við at fáa »tað russiska valevnið« Viktor Janukovitj valdan til forseta, sama hvussu tað skuldi gerast. Eitt nú var Putin fleiri ferðir í Ukraina undir forsetavalstríðnum har fyri at vísa Janukovitj sín stuðul.

Nøkur lond vestanfyri hava samtíðis roynt at styðja »teirra valevni«, andstøðuleiðaran Viktor Jusjtjenko. USA hevur ikki dult sín stuðul til hansara, men í Russlandi hevur tað vakt størri ans, at Niðurlond hava gjørt tað sama, tí landið hevur í løtuni formansskapin í ES.

Tí kundi okkurt bent á, at uppgerðin um framtíðina hjá Ukraina kann enda sum ein álvarssom kreppa ímillum Vesturheimin og Russland, og at støðan verður aftur sum undir Kalda Krígnum, um illa vil til.

Tey seinastu árini hava Vesturheimurin og Russland verið í hornatøkum ymsastaðni. Russar hava framvegis ikki sissað seg eftir ósigurin í Georgia, har ein friðarlig kollvelting koyrdi tað russiskt vinarliga stýrið frá, og vesturlendskir diplomatar hava ikki dult fyri, at USA átti ein virknan lut í skiftinum. Í vár noyddust russar at hyggja at, meðan flogfør hjá NATO flugu eftirlitsferðir uppi yvir teimum baltisku londunum, eftir at londini høvdu kært seg um, at russiska flogvápnið fleiri ferðir var komið inn um mark.

## Stórmál

Men hesi bæði málini eru smámál samanborið við tað, sum kann henda við Ukraina, og tað er uttan iva orsøkin til, at Vesturheimurin og Russland hava verið varin við at leggja seg ov nógv úti í ta politisku ósemjuna har. Ukraina er ikki Georgia. Tað er ov stórt og ov nær og hevur harafturat stóran strategiskan týdning fyri báðar partar.

Hvørki Evropa ella USA eru kortini sinnað at gera Ukraina til tann stóra stríðsspurningin ella til eina upgerð ímillum Eystur og Vestur. Tí bæði evropearar og amerikanarar stúra fyri, hvat tað kann fara at kosta, eydnast tað at fáa Viktor Jusjtjenko í forsetaembætið. Tað er eingin ivi um, at tað hevði verið ein dyggur smeitur fyri Putin, og at tað kann fáa stórar avleiðingar fyri viðurskiftini ímillum Russland og Vesturheimin. USA hevur brúk fyri russiskum stuðuli í bardaganum ímóti yvirgangi, og ES hevur brúk fyri Russlandi til Kyotosáttmálan.

Harafturat kemur, at Vesturheimurin er ikki klárur við nøkrum beinleiðis tilboði til Ukraina, skuldi tað hent, at Jusjtjenko verður forseti, tá saman um kemur. Í ES og NATO hava menn havt nóg mikið við at biðja ukrainar geva tol. ES hevur úr at gera við at fáa viðurskiftini í teimum nýggju limalondunum í Eystur- og Miðevropa í rættlag, og harafturat stendur Turkaland og pikkar upp á dyrnar. Tað er eisini greitt, at londini á Balkan koma fram um Ukraina. Í NATO er støðan tann sama. Har eru londini á einum máli um, at tað er at ganga Russlandi ov nær at bjóða Ukraina limaskap.

## Bólturin hjá ukrainum

Hóast vesturlendskir leiðarar hava sagt seg styðja andstøðuna í Ukraina, er tað ein sannroynd, at í veruleikanum stendur landið rættiliga einsamalt, og tí aftra nógvir politikarar seg við at geva ukrainum ov stór lyfti.

Kortini bendir alt á, at orðadrátturin ímillum Putin og teir vesturlendsku leiðararnar hóast alt er endaður við einari semju um, hvussu tann politiska ósemjan skal loysast. Partarnir eru samdir um, at ósemjan skal loysast á friðarligan hátt ígjøgnum ta politisku og tað løgfrøðiligu skipanina, hóast tað neyvan var tað, Putin hevði ætlað.

Tískil liggur bólturin hjá ukrainum sjálvum. Forsetavalið vísti, at fólkið gongur í tveimum næstan líka stórum bólkum. Annar parturin vil hava tættari samband við Russland, hin við Vesturheimin. Tað besta boðið tykist vera, at partarnir gera eina politiska semju um at býta valdið sínamillum.

*(Kelda: Berlingske Tidende)*